## PEDAGOGAR TIL DAGSTOVNIN Í FUGLAFIRÐI

**Søkt verður eftir pedagogum til vøggustovu og barnagarðstovu.**
**Byrjað verður 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.**

Tvey pedagogstørv á 40 t. viku í barnagarðsstovu.
Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu.
Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu.

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsið. Dagstovnurin sum er ætlaður til 76 børn byrjaði í 1991 og í 2006 varð dagstovnurin útbygdur við einari stovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum sum:**
- hevur fakliga royndir og vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðnum.
- sær møguleikar fram um mørk og tolir broytingar.
- kann arbeiða sjálvstøðugt, er førir fyri at orða seg skrivliga.
- er eldhugaður, jaligur og hevur góð samstarvsevnir

**Vit kunnu bjóða tær :**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur.
- eitt starv, har tú kanst brúka tína dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan.
- samstarv við NSR tænastu, náms-og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.

**Setanartreytir:**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum, Juliannu Næs á tlf. 737780.
Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða **Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10 b, 530 Fuglafjørður** í hendi í seinasta lagi **21. januar 2008 kl. 10.00**

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 4.
Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

**Fuglafjarðar Kommuna**

# Kunngerð

Samb. kunngerð nr. 109 frá 7. desember 2007 fer løgtingsval fram
**leygardagin tann 19. januar 2008 á kommunuskrivstovuni í Leirvík.**

Atkvøðugreiðslan byrjar
**kl. 10.00 fyrrapartin og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.**

**Brævatkvøður**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, tann 18. januar 2008, greiða brævatkvøðu við at venda sær til fólkayvirlitið/kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu vera valstýrinum í hendi **innan** valið byrjar kl. 10.00 tann 19. januar 2008.

**Heimaval**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá 12. januar 2008 til og við 18. januar 2008 við at boða frá til kommunuskrivstovuna – helst innan kl. 15.00 fríggjadagin tann 18. januar 2008.

**Valkort**
Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Leirvíkar Kommunu og **skulu** nýtast til valavgreiðsluna. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

*Leirvík, tann 07. januar 2008*

**Valstýrið í Leirvíkar Kommunu**

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvík

# Kunngerð

Sambært kunngerð nr. 109, frá 07. desember 2007 fer løgtingsval fram

**leygardagin tann. 19. januar 2008**
**í skúlanum skúlastova nr. 1.**

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, tann 18. januar 2008, greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl 10.00 tann 19. januar 2008.

**Heimaval:**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá 12. januar 2008 til og við tann 18. januar 2008 við at boða frá til kommunuskrivstovuna – helst innan kl. 15.00 hósdagin tann. 17. januar 2008.

**Valkort:**
Vart verður gjørt við, at valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna.

Hesi verða send út við postinum til allar løgtingsveljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.

*Sørvágur, 7. januar 2008*

**Valstýrið í Sørvágs kommunu**

Oddur Petersen, form.

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 332004

## Limagjaldið er kr. 220 fyri mánaðin í 2008

Tey seinastu 5 árini hevur limagjaldið verið kr. 200 fyri mánaðin, men av tí at útreiðslurnar eru hækkaðar nógv hesi árini var neyðugt at hækka limagjaldið.

Frá 1. januar 2008 er limagjaldið kr. 220 fyri mánaðin.

**Havnar Sjúkrakassi**

***Tórshavn 3. januar 2008***

## Høli í Klaksvík til leigu

Niðara hæddin á Restaurant Hereford til leigu.

Hølið er 140 m², er fult útgjørt sum café, men kann tó nýtast til mong onnur endamál, so sum kontór, handil, o.a.

**Áhugaði kunnu ringja tlf. 21 64 34.**

## Tvøroyrar Býráð - Almennir fundir 2008

Almennnir fundir Tvøroyrar býráðs í 2008 verða:

| | |
|---|---|
| 7. januar | 1. september |
| 4. februar | 6. oktober |
| 3. mars | 3. november |
| 7. apríl | 8. desember |
| 5. mai | 29. desember |
| 9. juni | |

Allir fundirnir verða mánadagar kl. 17:00 í býráðssalinum.

TVØROYRAR BÝRÁÐ

## ARBEIÐSFÓLK

Pizza 67 í Tórshavn søkir arbeiðsfólk at arbeiða í skiftandi vaktum.

Vit ynskja at tú:
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Er álítandi og hevur góð samstarvsevni

Løn sambart avtalu.

Ynskir tú at frætta meira um starvið, so er tú vælkomin at ringja 221 221 og tosa við Rúna Kruse